Áhugabólkurin Reynsmúli
Rygsvegur 3
700 KLAKSVÍK

Argir hin 17. juni 2024
Málsnr.: 24/06121
Málsviðgeri: Rúna Hjelm

**Loyvi til at søkkja skip á Borðoyarvík til kavingarendamál**

Umhvørvisstovan veitir við hesum, sambært § 21, stk. 1 í løgtingslóg nr. 59 frá 17. mai 2005 um verju av havumhvørvinum, við seinni broytingum, loyvi til at seta ein 30 metra langan stálbát niður á botn á Borðoyarvík til kavingarendamál.

## 1. Umsókn

Umhvørvisstovan fekk 5. september 2023 umsókn frá Oliver Joensen, sum vegna Áhugabólkin Reynsmúla, v/ spf. Mekanor, spf. Kaving, spf. Kav og spf. Á Hædd í Klaksvík søkti um loyvi til at søkkja M/S Helenu á Borðoyarvík út fyri Norðoyri. Ætlanin er at leggja skipið á 25 metra dýpi á havbotnin vestanfyri vrakið av Reynsmúla, ið er søkt á 14-15 metra dýpi (sí mynd niðanfyri).



Ætlanin er, at skipið verður fest í botnin við tveimum akkerum á 1.000 kg/hvørt og við ketum, ið viga 2.300 kilo/hvør. Umsøkjararnir upplýsa, at tað er grovur skeljasandur í økinum, og at akkerini eru egnað til sandbotn.

Endamálið við verkætlanini er at geva frítíðarkavarum høvi at kava niður á vrakið.

## 2. Málsviðgerð

Søkking av skipum er bannað sambært havumhvørvislógini[1] og altjóða lóg, um endamálið er burturbeining.

Hinvegin er loyvt at seta ella byggja eitthvørt á havbotninum til ávíst endamál. Í hesum sambandi kann eitt skip, sum annars skuldi verið burturbeint, nýtast í staðin fyri annað tilfar, treytað av, at tað ikki førir dálking ella hevur annan skaða á náttúruna við sær.

Sambært havumhvørvislógini kunnu verkætlanir á sjónum og fram við strondini, sum kunnu ávirka náttúru og umhvørvi munandi, ikki setast í verk uttan góðkenning frá Umhvørvisstovuni. Í hesum sambandi skal Umhvørvisstovan hoyra viðkomandi myndugleikar, felagsskapir o.o.

Umhvørvisstovan hevur sent umsóknina til Vørn, Landsverk og Klaksvíkar kommunu til viðmerkingar. Landsverk svarar, at ongar siglingarleiðir eru í økinum, og tískil hevur Landsverk ongar viðmerkingar til verkætlanina. Vørn og Klaksvíkar kommuna hava skrivliga boðað frá, at ongar viðmerkingar eru til verkætlanina.

Umhvørvisstovan heldur ikki, at skipið fer at verða atvold til dálking ella fer at ávirka náttúruvirði á staðnum nevnivert, um alt dálkandi tilfar verður tikið úr skipum, áðrenn tey verða søkt.

## 3. Loyvi

Umhvørvisstovan veitir við hesum loyvi til, at M/S Helena verður sett á botn á Borðoyarvík.

Loyvið verður givið við hesum treytum:

3.1 Áðrenn skipið verður søkt, skal alt dálkandi tilfar takast úr skipinum, so sum olja, elektriskir lutir, kaðlar, tangar o.a.
3.2 Allir vandamiklir lutir verða tiknir úr skipinum, áðrenn tað verður søkt.
3.3 Um høvuðsmaskina og hjálpimotorur verða eftir í skipinum, skulu botnkør tømast fyri olju og motorarnir skolast ígjøgnum áðrenn skipið verður søkt, og skal váttan sendast Umhvørvisstovuni, um at arbeiðið er gjørt.
3.4 Skipið skal sýnast av Umhvørvisstovuni, áðrenn tað verður søkt. Boðast skal frá til Umhvørvisstovuna í minsta lagi tvær vikur frammanundan.
3.5 Skipið skal verða staðsett sum greitt er frá í umsóknini. Knattstøða fyri staðsetingina av skipinum verður sent til Umhvørvisstovuna, eftir at skipið er sett á botn.

[1] Løgtingslóg nr. 59 frá 17. mai 2005 um verju av havumhvørvinum, við seinni broytingum

3.6 Skipið skal brúkast til ætlaða endamálið. Verður skipið ikki brúkt til endamálið, fellur loyvið burtur, og skal skipið takast upp og burturbeinast sambært galdandi reglum fyri loyvishavarans rokning.
3.7 Eftir at skipið er søkt, skal loyvishavin tryggja og hava eftirlit við, at skipið verður liggjandi sum ætlað.
3.8 Loyvishavin skal taka møguligar vraklutir upp og burturbeina teir eftir galdandi reglum.
3.9 Loyvishavin skal á hvørjum ári senda Umhvørvisstovuni frágreiðing við myndum um støðuna hjá vrakinum. Aftan á trý ár kann loyvishavin søkja um, at títtleikin verður broyttur.
3.10 Umhvørvisstovan kann geva boð um, at skipið verður tikið upp og burturbeint fyri loyvishavarans rokning um
- óvæntað dálking, ampar ella skaði stendst av tí,
- treytirnar í loyvinum ikki verða hildnar.

3.11 Loyvið fellur burtur, um skipið ikki er søkt á givna staðnum áðrenn eitt ár eftir, at loyvið er givið.

## 4. Kæruvegleiðing

Henda avgerð kann, sambært § 24 í løgtingslóg nr. 132 frá 10. juni 1993 um fyrisitingarlóg, kærast til landsstýriskvinnuna við umhvørvismálum. Kæran skal sendast Umhvørvisstovuni, sum síðani sendir hana til Heilsu- og innlendismálaráðið saman við neyðugum skjølum. Kærufreistin er fýra vikur frá tí degi, hetta loyvið er givið, og skulu kærur vera Umhvørvisstovuni í hendi í seinasta lagi 17. juli 2024.

______________________________

Sigga Jacobsen, deildarleiðari

______________________________

Rúna Hjelm, umhvørvisviðgeri